# Statsgó›kendur pensiónistur

*OTIUM. Í samfull 47 ár hevur Jógvan Sundstein liva› av at fimla vi› tølum. Í gjár leg›i hann frá sær sum stjóri á Grannsko›aravirkinum, Inpact, tí hann heldur vil vera vanligur vinnulívsma›ur*

HøGNI MOHR

Jógvan Sundstein roknar vi› at fáa betri tí›, nú hann gevst sum grannsko›ari.

- Eg vóni, at eg fái tí› at vera fleksibul, seg›i hann vi› Sosialin í gjár.

### N‡tt arbei›sskei›

Pensiónera›i politikarin og grannsko›arin, sum hevur rokki› teimum 67 árunum, ætlar sær kortini ikki at ganga hendur í lumma. Og hann ver›ur heldur ikki at síggja umbor› á báti ni›ri í Vágsbotni ella vi› rumpuni hægst, leitandi eftir ókrúti í urtagar›i sínum.

Jógvan Sundstein fer framvegis at vera vinnulívsma›ur.

- Gamaní, eg fari at deponera mínar grannsko›araløggildingar. Men hetta geri eg, tí ta› er eitt lógarkrav, um eg skal sleppa at arbei›a sum vanligur vinnulívsma›ur. Og ta› ætli eg mær, sigur Jógvan Sundstein, sum fer at vera stjóri í trimum minni feløgum, nú hann gevst á grannsko›aravirki sínum, Inpact.

### Samstarva vi› sonin

Ta› er ein sonur Jógvans, sum eigur størsta partin av hesum feløgum. Felagi›, har Jógvan í størsta mun fer at virka, er rá›gevingarvirki›, JSS Consult. Í hesum felagi› ber til at leita sær fíggjarliga og vinnuliga rá›geving. Og Jógvan gle›ir seg at fara undir at arbei›a saman vi› soninum.

- Sonurin er ungur, hevur arbei›smegina og er n‡móttans, me›an eg havi royndirnar. So ta› ver›ur óiva› eitt hóskandi samstarv, væntar Jógvan Sundstein.

### Hóskandi aldur

Avger›in um at fara frá sum grannsko›ari hevur búnast í Jógvani seinasta ári›.

- Tá i› eg hev›i hugsa› gjølla um ta›, helt eg ta› vera hóskandi at fara frá, nú eg var› 67 ára gamal. Hesin aldur ver›ur ofta hildin sum pensiónsaldurin, so ta› passa›i fínt. Undir øllum umstø›um hev›i eg ikki vilja› bí›a› til fólk fóru at teska sínamillum, »nær mann hann fara...?«, sigur Jógvan, men skoytir beinanvegin upp í, at ta› hev›i hann kortini ikki vænta, at nakar fór at siga.

### Takk fyri meg

Fyrradagin var móttøka á Hotel Hafnia í sambandi vi›, at Jógvan Sundstein fer frá. Nógv fólk vóru og heilsa›u. Talan var um ein brei›an skara av menniskjum, i› hava havt samband vi› Jógvan hesi mongu ár; vi›skiftafólk, vinir og politikarar.

- Eg havi ta› solei›is, at tá i› avger›in er tikin, so er ta› kensluborna avklára›. Tí kendi eg bara takksemi á mær undir móttøkuni. Øllum teimum, sum hava hildi› meg út, vil eg takka fyri ta› farna, sigur Jógvan Sundstein at enda.



*Frá í dag er Jógvan Sundstein ikki longur statsgó›kendur gransko›ari*

Mynd: Jan Müller

# Próvtøkur á Maskinmeistaraskúlanum

HøGNI MOHR

Tveir flokkar fingu prógv á maskinmeistaraskúlanum í farnu viku. Talan var um M6-flokkin, sum er manna›ur vi› 3. árs næmingum. Teir eru nú maskinmeistarar. Hin flokkurin er M2-flokkurin, har 1. árs næmingarnir hava tiki› prógv. Hesir kunnu nú kalla seg maskinistar. Úrsliti› í ár hevur veri› javnt gott, men onkur skara›i kortini burturúr. Besti næmingurin, i› var til endaliga próvtøku sum maskinmeistari fekk 10,9 í me›al. Hetta er besta úrsliti› á maskinmeistaraskúlanum sí›ani útbúgvingin var› umskipa› í 1989.

Gløggi næmingurin var Bogi Beck Jensen úr Havn.



*MASKINMEISTARAR. Aftast frá vinstru: Sjúr›ur Vatnsdal, Bogi Beck Jensen, Hans Christian Rickney og Jón í Gong.*

*Fremst frá vinstru: Petur á Dul Patursson, Jákup Weihe, Kristian Holm Stórhamar, Kári Mikkelsen, Hardy Hansen, Ey›un Matras og Sámal úr Skúvoy Johansen.*

Mynd: Álvur Haraldsen



*MASKINISTAR. Aftast frá vinstru: Albin Vang Ísaksson, Jóhan Weihe, Hans Michal á Fløtti Jacobsen, Jósef Jacobsen, Hans Jákup Arge Jacobsen, Jens A.K. Sørensen, Pól Jákup S. Lassen, Jógvan Dalsgaard, Jógvan Heinesen, Jónhard Johannesen, Julian Johannes Olsen og Sonni Johannesen.*

*Fremst frá vinstru: Ólavur K. Gunnarson, Magnus Magnussen, Suni Mortensen, Regin Reinert, Ken Bærentsen og Bjartur Wacher.*

*Tveir n‡klaktir maskinistar vóru ikki vi›, tá i› myndin var› tikin. Teir vóru Jonny Durhuus og Gunnar Olsen.*

Mynd: Álvur Haraldsen



# Tung, men góð og eggjandi byrjan

Skeiðsdepilin á Langasandi hevur endað fyrsta starvsár sítt, støðan verður gjørd upp og lagt verður til brots aftur í september við áræði

Nýggi privati frálæru- og útbúgvingarstovnurin, sum fór undir ymisk vistarskeið seinasta heyst, hevur hilnast betri enn væntað, men tó ikki so væl, sum vónað varð eina tíð. Árið eydnaðist væl, og teir um sjeyti luttakararnir hava latið væl at; fleiri fóru til og stóðu altjóðaliga viðurkendar próvtøkur.

Hóast íløgurnar gjørdust størri, enn roknað var við, hevur raksturin gingið so væl, at haðani hevur verið gjørligt at rinda hampiligan part av íløgunum í ognina, innbúgv, amboð, tilfar og annað. - Tað er at siga, at raksturin ber seg, men íløgurnar tyngja framvegis í meira lagi.

So statt fer smápartafelagið, sum eigur og rekur Depilin, á aðalfundi í næstum at hækka partapeningin, broyta leiðsluna nakað og bjóða fyritøkum, virkjum, stovnum og einstaklingum at seta pening í Skeiðsdepilin, so orkan kann verða miðsavnað um sjálvt skeiðsvirksemið.

**Skeiðsrøðir 2000/2001**

Starvsárið 1999/2000 skipaði Skeiðsdepilin millum annað fyri trimum skeiðsrøðum í enskum, tveimum, sum Frímerkjadeildin hevði bílagt, tveimum serskeiðum, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevði biðið um og trimum serskeiðum fyri Atlantic Airways. Samanlagt vóru umleið 5 skeið um mánaðin, annaðhvørt vikuskifti (fríggjakvøld-sunnudag) ella miðvikur (týskvøld-hósdag), frá september 1999 til maj 2000.

Í komandi starvsári, 2000/2001, hava vit millum annað lýst við teimum skeiðum, sum hildin vórðu í 1999/2000, umframt fyribils nøkrum einstøkum yrkisskeiðum, til dømis »Prógv í enskum í altjóðaligum handilsskapi og fyrisiting« og »Yrkisskeið fyri lærarar í enskum«, eins og eitt nýtt byrjanarskeið í enskum stendur í boði. - Strembað verður eftir at fáa áheitanir um at skipa fyri øðrum skeiðum, eitt nú vegna virki, fyritøkur, stovnar og felagsskapir. — Sum dømi kann nevnast, at »Teinaringafelagið« heldur skeið á Deplinum eina viku í september, har norskur reipssnillingur fer at stíla fyri, hvussu reip verða viðgjørd, viðfarin, umframt knútar, spleisingar og tílíkt.

**Fjølbroytt tilboð**

So møguleikarnir eru sera fjølbroyttir. Og teir skeiðsleiðarar, ið knýttir eru at Deplinum, hava yvirhøvur hægri universitetsútbúgving og drúgvar royndir í at stíla fyri og halda skeið; samband er eisini við serkøn fólk á flestøllum økjum.

Skeiðini, ið lýst eru og verða, fevna um: Enskt byrjanarstig, 6 vikuskifti; Enskt lágstig (KET), 6 vikuskifti; Enskt framhaldsskeið (PET), 6 vikuskifti; Føroysk fyri øll , 6 vikuskifti; Faroese for non-Nordic Speakers, 6 vikuskifti; Enskt hástig (FCE), 6 miðvikur, Ensk í Altjóða Samskifti, Handli og Umsiting, yrkisskeið (CEIBT), 8 miðvikur; Altjóðaligt læraraskeið í enskum, yrkisskeið (CEELT), 6 miðvikur og Enskt í Ferðavinnuni (CTE), yrkisskeið, 6 miðvikur. - Onnur skeið og tiltøk eru eisini í umbúnaði komandi vetrarhálvuna, 2000/2001, og tey verpa lýst so hvørt.



Øll skeið á Deplinum eru almenn vistarskeið, t.v.s. at fólk fáa frálæru, innivist og allar máltíðir teir 2-3 dagarnar, hvørt skeiðið varir. Kostnaðirnir eru nakað lægri enn aðrastaðni, millum 10.000 og 15.000 fyri heila røð, t.e. um 120 tímar, ella millum 2.000 og 2.500 fyri stakskeið. Fyritøkur, stovnar og bólkar fáa avsláttur. Og Depilin verður í serstøkum førum leigaður til skeið, sum onnur skipa fyri.

Nágreiniligari tilfar um Depilin og ymisku skeiðini, savnað í mappu, fæst við at venda sær til: Skeiðsdepilin á Langasandi, 438 Langasandur; telefon 422574, fax 422521.

## Nýggjur almannastjóri

EIRIKUR LINDENSKOV

Í gjár setti Helena Dam á Neystabø Petru Joensen í starv sum stjóra á Almannastovuni.

Petra Joensen er 55 ára gomul. Hon tók prógv sum løgfrøðingur á Københavns Universiteti í 1989. Hon hevur hollan kunnleika í leiðslu. Í løtuni starvast hon sum leiðari á deildini fyri starvsfólk, menning og útbúgving á »Kolonien Filadelfia«.

Petra Joensen hevur eisini lokið prógv sum Master og Public Policy.

# Kupongheftini komin til Føroya

SVEINUR TRÓNDARSON

Um dagarnar kom onnur útgáva av lýsingarblaðnum Mediaberg Føroya kuponghefti á gøtuna. Blaðið er eitt lýsingar- og sølublað burturav, og endamálið er sjálvsagt, at økja um søluna hjá lýsarunum.

Slík lýsingarbløð eru rættiliga nýggj á føroyska marknaðinum, men eitt nú í Danmark eru tey útkomin í nógv harrans ár. Og tað er eisini í Danmark, at upprunin til hetta blaðið skal finnast. Fyritøkan aftanfyri blaðið er donsk, men annars eigarin er føroyingur og eitur Heidi Vágsá.

Tá vit spyrja Heidi hví hon er farin undir hetta og hvagani hon hevur fingið hugskotið til blaðið sigur hon, at tað meiri at kalla var til stuttleika at hon byrjaði. - Eg havi búð niðri í eina tíð, og tað var tá eg gjørdist arbeiðsleys, at eg fekk hugskotið. Slík bløð eru komin út her niðri í langa tíð, og eg vildi fegin royna, um tað bar til í Føroyum eisini. Samstundis fekk eg so okkurt at takast við, og tað var tað, sum eg ætlaði, sigur Heidi.

Men hvussu hava tit valt lýsingar út til blaðið?

- Vit hava í grundini ikki valt lýsingar og lýsarar út. Vit hava sent skriv til fyritøkur og tað er á tann hátt, at lýsingarnar eru komnar. Kortini hava vit gjørt av at halda eina sera greiða linju viðvíkjandi ónærisligum lýsingum. Í Danmark er ikki óvanligt, at selja ónærisligar filmir og bløð ígjøgnum kupongheftini, men tað fer ikki at vera í tí føroyska blaðnum, sigur Heidi Vágsá.

Hvør er málsetningurin við blaðnum?

- Málsetningurin við blaðnum er at geva eitt áhugavert lýsingarblað út. Vit hava avgjørt, at tað ikki skal vera ov stórt, tí annars er vandi fyri, at lýsararnir detta burturímillum. Tí hava vit avgjørt, at blaðið ikki skal vera størri enn 32 síður

Hvussu er blaðið móttikið?

- Millum lýsararnar er áhugin stórur. Juniútgávan er bert 12 síður, men tað er tí, at tað er ikki rætta tíðin fyri slík bløð. Besta prógvið fyri tí er, at vit longu nú hava nógvar áhugaðar lýsarar til augustútgávuna. Tað halda vit er eitt gott tekin, og tað vísir eisini, at tað er áhugi fyri einum slíkum lýsingarblað, sigur Heidi.

*Vita tit, hvussu nógv fyritøkurnar hava fingið burturúr tí fyrsta blaðnum?*

- Vit hava sjálvandi tosað við fyritøkurnar, sum lýstu í tí fyrsta blaðnum, og tær eru væl nøgdar. Í veruleikanum ber rættiliga illa til at máta, hvussu nógv ein fær burturúr, serliga so stutta tíð eftir at blaðið er komið út fyrstu ferð. Hinvegin eru eisini fyritøkur, sum síggja hetta sum ein alternativan møguleika at lýsa upp á, og tey máta ikki ta beinleiðis søluna. Men fyritøkurnar eru nøgdar, sigur Heidi Vágsá.

Hon leggur afturat, at aftursvarini eru á leið tey somu, sum fyritøkur fáa við at vera við í donskum kupongheftum.

Prísurin fyri at lýsa í nýggja lýsingarheftinum er 5.000 krónur fyri hvørja síðu inni í blaðnum. Heidi sigur, at tey hava hugsað um at selja hálvsíðulýsingar, men enn hevur tað ikki verið neyðugt. Hon leggur afturat, at ætla kundar sær at lýsa í eitt heilt ár, so er ikki óhugsandi, at teir fáa avsláttur.

ÚTSØLA
"Hinumegin vegin"
byrjar mánamorgunin 3. juli kl. 09.00
Vit hava flutt vøru frá hesi árstíðini yvirum vegin og selja hana fyri lítið og lætt!!!
M.a.
Joggingsett, hvít
Jakki v/ lynlási og hettu
Fyrr 448,- Nú 299,-
Buksur
Fyrr 348,- Nú 199,-
Joggingsett
natúr, violett, army, svørt
Jakki v/ lynlási og hettu
Fyrr 488,- Nú 299,-
Stutt blusa v/ hettu
Fyrr 348,- Nú 199,-
Buksur
Fyrr 248,- Nú 149,-
Anorakkur
v/ lynlási og hettu
úr sterkum bummullstvill
Bert small og medium
Fyrr 599,- Nú 299,-
29
Í Tróndargøtu
tel. 31 82 00
ella 21 81 99